# Føroyingar størri ávirkan á egnan uttanríkispolitikk

**Arbeiðið, sum er sett í verk fyri at lata føroyingum og grønlendingum størri heimildir á uttanríkispolitiska økinum, heldur fram, eru Jóannes Eidesgaard og Anders Fogh Rasmussen, samdir um**

RÍKISRÆTTARLIGA STØÐAN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Arbeiðið at geva Føroyum og Grønlandi størri heimildir á uttanríkispolitiska økinum, skal halda fram.

Tað eru Jóannes Eidesgaard, løgmaður og danski forsætisráðharrin, Anders Fogh Rasmussen, samdir um.

Á fundinum teirra millum týsdagin, tosaðu teir báðir eisini um at Føroyar og Grønland skulu.

Jóannes Eidesgaard sigur, at semja er um, at embætisverkið í Føroyum, Grønlandi og í Danmark í felag skulu halda fram við arbeiðnum at fyrireika lógaruppskot, har ið uttanríkispolitisku heimildirnar hjá Føroyum og Grønland verða staðfestar.

– Partarnir samdust um, at halda fram við tí arbeiði á embætismannastigi, sum Danmark, Føroyar og Grønland eru farin undir í sambandi við at lata Føroyum og Grønlandi størri heimildir á uttanríkispolitiska økinum.

Í hesum sambandi sær løgmaður fyri sær, at trupuleikar kunnu stinga seg upp.

– Danir hava sjálvsagt sína uppfatan av, hvussu stórar heimildir teir halda, at føroyingar og grønlendingar skulu hava og hinvegin hava vit føroyingar og grønlendingar eisini sína uppfatan av, hvussu stórar heimildir, vit kundu hugsa okkum at fingið.

Jóannes Eidesgaard heldur, at tað hevur týdning at fáa greiði á hesum heimildum.

– Eitt dømi er, at tað er Danmark, sum umboðar Føroyar og Grønland í altjóða hvalaveiðifelagsskapinum, IWC. Men tað er ongin loyna at teir onkuntíð havaført sjónarmið fram, sum ganga beint ímóti okkara áhugamálum og tí er tað stak óheppið, at vit ikki kunnu umboða okkum sjálvi í hesum, eins og í øðrum uttanríkispolitiskum høpi, har, sum vit hava áhugað í.

– Vit vita eisini, at danir verða meiri og meiri bundnir at ES og nú verður eisini tosað um eina ES grundlóg. Tað kann eisini føra við sær, at ein partur av uttanríkispolitikkinum verður fluttur til Brússell. Tí hevur tað týdning, at vit sjálvir fáa heimild at røkja tey uttanríkispolitisku áhugamál, sum hava týdning fyri okkum.

– Helst vilja vit sleppa longri, enn danir eru sinnaðir at fara. Men hetta verður ein telving ímillum embætisfólkini, sum í síðsta enda skal enda við eini politiskari semju.

Men, hvar hendan semjan kemur at verða, dugir løgmaður ikki at síggja fyri sær, útfrá fundinum við Anders Fogh Rasmussen týsdagin.

Men hann sigur, at partarnir eru samdir um, at eisini hesar samráðingarnar skulu enda við eini lóg, sum skal vera liðug í heyst, so at hon kann koma í gildi á nýggjárinum.



*Føroyingar skulu hava størri ávirkan á egin viðurskifti í uttanríkismálum. Jóannes Eidesgaard, løgmaður og Anders Fogh Rasmussen eru samdir um at halda fram við arbeiðnum, at víðka uttanríkispolitisku heimildirnar*

# Allur ivi um framtíð Føroya beinast av vegnum

**– Fundurin við danska forsætismálaráðharran var góður og konstruktivur, sigur Jóannes Eidesgaard, løgmaður**

RÍKISRÆTTARLIGA STØÐAN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Nú skal allur ivi beinast burtur um framtíð Føroya beinast burtur.

Tað eru Jóannes Eidesgaard, løgmaður, og Anders Fogh Rasmussen, forsætisráðharri, samdir um.

Og tað, teir báðir eru samdir um, er, at nú skulu allar avgerðir um framtíð Føroya takast í Føroya løgtingið, uttan uppíblanding og uttan nakrar sum helst forðingar úr Danmark.

Hetta er niðurstøðan, eftir fyrsta fundin ímillum Jóannes Eidesgaard, løgmann og danska forsætisráðharran eftir løgtingsvalið 20. januar.

Fundurin var týsdagin og har vóru tvey stórmál á skránni, sum hava stóran týdning fyri framtíð Føroya.

Í fyrra lagi tosaðu teir báðir stjórnarleiðararnir um, hvussu farast skal fram hereftir, tá ið føroyingar ætla at yvirtaka málsøki frá danska statinum.

Í øðrum lagi tosaðu teir um, hvussu føroyingar kunnu fáa størri ávirkan á uttanríkispolitisk viðurskifti, sum viðvíkja Føroyum.

Jóannes Eidesgaard sigur, at fundurin var bæði góður og konstruktivur og bæði hann og forsætisráðharrin løgdu dent á, at góða samstarvið millum londini heldur fram.

## Alt í løgtingsins hendur

Jóannes Eidesgaard sigur, at bæði Landsstýrið í Føroyum og danska stjórnin eru samd um at fáa heilt greiðar linjur fyri, hvussu farast skal fram, tá ið føroyingar vilja yvirtaka málsøki frá donsku stjórnini.

Higartil hava vit yvirtikið tey ymsu málsøkini eftir heimastýrislógini. Eftir henni eru tað nøkur mál, sum vit kunnu yvirtaka, nøkur mál, sum vit ikki kunnu yvirtaka og so eru tað nøkur mál, sum vit mugu samráðast við donsku stjórnina um at yvirtaka.

Men so eru tað eisini nógv málsøki, sum als ikki eru nevnd í heimastýrislógini og tvídráttir kann taka seg upp ímillum partarnar í ríkinum, hvussu farast skal fram, tá ið hesi ónenvdu málini, skulu yvirtakast.

– Tað, sum danski forsætismálaráðharrin og eg eri samdur um, er, at nú skal allur ivi beinast av vegnum, so at vit fáa heilt greiðar reglar fyri, hvussu farast skal fram, tá ið vit vilja yvirtaka málsøki, sigur løgmaður við Sosialin eftir fundin við danska stjórnarleiðaran.

Hann sigur, at teir báðir eru samdir um at halda fram við arbeiðnum, sum undanfarna samgongan setti í verk í sambandi við yvirtøkur.

Men yvirtøkulógin, sum ætlanin var at seta í verk, skal nú broytast og snikkast til eftir tí leisti, sum hendan samgongan hevur sett sær á ríkisrættarliga økinum.

Og teir báðir eru eisini samdir um, hvussu meginreglarnar í nýggju yvirtøkulógini skulu vera.

Í yvirtøkulógini, sum undanfarna landsstýrið arbeiddi eftir, stóðu eisini fleiri málsøki nevnd, sum skuldu yvirtakast, samstundis sum lógin kom í gildi.

– Hetta er nú broytt til, at ongi málsøki verða yvirtikin í sambandi við at sjálv lógin kemur í gildi.

– Tað, sum vit nú eru samdir um, er, at í yvirtøkulógini skulu nøkur málsøki nevnast, sum ikki kunnu yvirtakast, tí tey hava beinleiðis samband við ríkiseindina at gera.

Talan eru eitt nú um hernaðar- og trygdarmál, uttanríkispolitikk, statsborgaraskap og gjaldoyraviðurskifti, sum ikki kunnu yvirtakast, fyrrenn vit eisini fara úr ríkinum.

– Men øll hini málini skulu vit kunna yvirtaka, tá ið Løgtingið samtykkir tað, sigur løgmaður

– Sostatt verða øll yvirtøkumálini tikin úr heimastýrislógini og savnað í eina yvirtøkulóg, sum skal brúkast, hvørja ferð, eitt málsøki verður yvirtikið. Samstundis verður tað eina og aleina Løgtingið, sum ger av, um ávís málsøki skulu yvirtakast.

Hann sigur, at sostatt er mannagongdirnar, hvussu farast skal fram í sambandi við yvirtøkur, bæði gjørdar nógv greiðari og nógv einfaldari.

Samstundis hava føroyingar fingið nógv víðkaðar heimildir til at yvirtaka málsøki, tá ið semja er um tað í Føroyum, uttan at danir kunnu leggja seg út í tað.

– Sostatt liggur vegurin hjá føroyingum púra opin fyri at yvirtaka og eg vildi hildið, at hetta er eisini ein ætlan, sum fullveldisfólk kunnu taka undir við, sigur Jóannes Eidesgaard.

Løgmaður sigur, at nú liggur bólturin hjá samgonguni í Føroyum og nú hann er heimafturkomin, fer hann at seta arbeiðið ígongd at gera eitt útkast til eitt lógaruppskot.

Hann sigur, at tá ið semja er um tað nýggju yvirtøkulógina, skal hon samtykkjast sum lóg, bæði í danska Fólkatinginum og í Føroya Løgtingi.

Hann sigur eisini, at miðjað verður eftir, at lógin verður liðug í heyst so at hon kann verða sett í gildi longu á nýggjárinum.



*Fundurin var bæði góður og konstruktivur, segði Jóannes Eidesgaard, løgmaður eftir fundini við Anders Fogh Rasmussen, forsætisráðharra týsdagin*

*Mynd: Símun J. Hansen*

# Skulu venda aftur til flogvøllin

**Á fundi ímillum danska forsætisráðharran og løgmann varð eisini tosað um at yvirtaka flogvøllin**

RÍKISRÆTTARLIGA STØÐAN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Hvussu skulu trupulleikarnir á flogvøllinum í Vágum loysast?

Hetta var eisini eitt mál, sum Jóannes Eidesgaard tosaði við Anders Fogh Rasmussen um á danmarkarferðini týsdagin og mikudagin.

Jóannes Eidesgaard vísir á, at ætlanin hjá føroyingum at yvirtaka flogvøllin í Vágum hevur verið ein afturvendandi ósemja ímillum føroyingar og danir.

Danir hava bjóðað okkum at yvirtaka flogvøllin fyri onki.

– Men tað verður í tí standi, sum hann er í nú. Tað merkir so aftur, at vit mugu sjálvir gera og rinda fyri allar tær útbyggingar og ábøtur, sum krevjast, sigur løgmaður

Hann sigur, at hann hevur víst á, at flogvøllurin er danskt ábyrgdarøki.

– Og tað er ein spurningurin er, hvussu áhugaðir vit eru fyri at yvirtaka ein flogvøll, sum hevur stórar ábøtur fyri neyðini, sigur løgmaður.

Jóannes Eidesgaard sigur, at á fundinum við danska forsætisráðharran, varð flogvøllinum tikin fram og trupuleikin kritaður upp fyri báðum pørtum.

– Vit hava víst á, at hetta er ein trupuleiki hjá báðum pørtum og tað hava báðir partar staðfest.

Hann sigur, at hann og Anders Fogh Rasmussen eru samdir um at venda aftur til flogvøllin.

Men hvat tað kemur at føra til, dugir løgmaður ikki at siga í løtuni.



# Vilja tosa um at lækka rentu av lánum til Føroya

**Danska stjørnin er eisini sinnað at lata føroyingum somu upplýsingar frá fíggjareftirlitinum, sum hon sjálv fær**

RÍKISRÆTTARLIGA STØÐAN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Danir eru sinnaðir at samráðast við føroyingar um at lækka rentuna av teimum lánum, sum vit hava frá danska statinum. Tað fekk Jóannes Eidesgaard, løgmaður, at vita frá danska forsætisráðharranum á fundinum í Keypmannahavn týsdagin.

À fundinum varð eisini tosað um rentuna av teimum lánum, sum føroyingar hava frá danska statinum.

Í tí sambandi váttaði Anders Fogh Rasmussen, at danska stjørnin er sinnað at tosað um rentuna, sum føroyingar halda er ov høg, soleiðis sum peningamarknaðurin nú er.

– Vit avtalaðu, at landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Bàrður Nielsen, skal taka málið upp við danska fíggjarmálaráðharran.

Tað merkir, at danir eru sinnaðir at tosa um at lækka rentuna.

Jóannes Eidesgaard sigur, at hetta er ein ávís sparing hjá føroyingum, hóas talan ikki er um tað stóra.

Ì løtuni betala vit 5% í rentu og tað er høg renta, soleiðis sum viðurskiftini nú eru.

Hinvegin eru lánini so nógv niðurgoldin nú, at hóast talan verður um eina rentulækking, verður fíggjarligi vinningurin hjá føroyingum avmarkaður.

## Landsstýrið fleiri upplýsingar

Somuleiðis er danski forsætisráðharrin positivur fyri at broyta lógina, so at landsstýrið hereftir skal fáa somu upplýsingar frá danska fíggjareftirlitinum um føroyskar peningastovnar, sum danska stjórnin fær.

Anders Fogh Rasmussen heldur, at tað er rímiligt at Føroya Landsstýrið fær somu upplýsingar um viðurskiftini hjá føroysku peningastovnunum, sum stjørnin fær frá fíggjareftirlitinum.

Avtalað varð, at landsstýrismaðurin í fíggjarmálum skal eisini taka hetta málið upp við danska búskaparmálaráðharran.

– Hetta er eitt gamalt stríðsmál, tí longu í kjalarvørrinum á kreppuni, fýltust føroyingar á, at teir vistu ikki, hvussu tað var statt hjás bankunum, tí landsstýrið fekk ongar upplýsingar frá fíggjareftirlitinum, sum bara gav dosnku stjørnini upplýsingarnar. Í 1997 samtykti Løgtingið at arbeiða víðari við málinum og fyri kortum reisti eisini Tórbjørn Jacobsen, fólkatingsmaður, málið í fólkatinginum.

Men nú er líkt til, at tað ber til at finna eina loysn á hesum trupulleikanum.

# Týdningurin av støðini á Sornfelli skal kannast

**Løgmaður hevur enn onga meining um brævið frá fólkaflokkinum um at føroyingar sjálvir skulu reka støðina á Sornfelli, saman við NATO**

RADARSTØÐIN Á SORNFELLI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Landsstýrið fer nú at kanna, hvønn týdning, radarstøðin á Sornfelli hevur. Samstundis fer Landsstýrið at kanna eftir, hvørjar avleiðingar tað fer at fáa, um støðin verður niðurløgd.

À fundinum ímillum Anders Fogh Rasmussen og Jóannes Eidesgaard varð eisini komið inn á uppskotið hjá donsku stjórnarflokkunum um at niðurleggja radarstøðina á Sornfelli.

Men danska stjórnin hevur eisini gjørt sær greitt, at málið skal leggjast fyri føroyskar myndugleikar.

Men fyri at kunna taka støðu til tað málið, verður neyðugt hjá okkum at kanna viðurskiftini út í æsir.

– Tí hava vit boðað danska forsætisráðharranum frá, at vit ætla at kanna málið nærri, sigur løgmaður.

Avtalan við Anders Fogh Rasmussen er sostatt, at løgmaður skal seta seg í samband við danska verjumálaráðharran fyri at viðgera spurningin saman við honum.



*Fyrrenn vit vita, hvønn týdning støðin á Sornfelli hevur, ber ikki til at hava eina meining um uppskotið frá fólkaflokkinum, sigur Jóannes Eidesgaard, løgmaður*

## Ongan hernaðarligan týdning

Jóannes Eidesgaard sigur, at tað, sum hevur áhuga fyri okkum, er ikki, hvønn hermálsligan týdning, støðin hevur.

– Tað, sum hevur okkara stóra áhuga, er at lýsa so væl sum gjørligt, hvønn týdning, støðin hevur fyri vanligu loftferðsluna og skipaferðsluna í økinum rundanum Føroyar og, hvønn týdning, hon hevur fyri leitingar- og bjargingararbeiðið kring Føroyar.

Jóannes Eidesgaard sigur, at enn er avgerð ikki tikin um at leggja støðina niður.

– Fyribils er talan um eitt uppskot til eina semju og nú eu samráðingar ímillum stjórnarflokkarnar um uppskotið, og tí er avgerð ikki tikin enn um at niðurleggja støðina.

Tú hevur fingið bræv frá fólkaflokkinum um støðina, sum vit endurgeva aðrastaðni í blaðnum og har flokkurin sigur, at vit eiga at umhugsa at reka støðina sjálvir, saman við NATO, um so er, at danir ikki vilja vera við longur?

– Eg haldi ikki, at tað er ábyrgdarfult av mær at gera viðmerkingar til tað, fyrrenn vit hava fingið greiði á, hvønn týdning, støðin í veruleikanum hevur fyri vanliga skipaferðslu og loftferðslu í Føroyum og fyri leiting og bjarging o.s.fr.

– Fyrrenn vit hava fingið greiði á tí, ber ikki til at hava eitt greitt sjónarmið um støðina, sigur Jóannes Eidesgaard.